LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprisur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

PÍKADEKK
Píkadekk (185´R 14 passa til nógvar vørubilar)- til sølu.Eru bert einaferð nýtt, og tískil heilt góð.
Tlf. 221413

TOYOTA HIACE
2,4 D til sølu. Koyrt 164.000 km, sýnaður 12/02, árg. 93, 4 pikadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 572806

TIL SØLU
Sera góður Fiat Punto biliga til solu. 3 ára gamal, fígging kann útvegast. T.d. útgjald bert kr. 16.000,-
Tlf. 217300

PÍKADEKK Á FELGUM
Fýra píkadekk á felgum stødd 185/65 R14, til sølu fyri kr. 1.200,- Passa til Cítroen Xsara.
Tlf. 265295 eftir kl. 17

TIL SØLU
Ford Mondeo 1.8, árg. 96, koyrt 93.000 km. Hevur el-rútar framman, el-spegl við hita, aircon, hita í setrum, sportfelgur, summardekk á sportfelgum, vetrardekk á felgum. Gev eitt boð.
Tlf. 444737 ella 214437

TIL SØLU
Ein VW Golf, árg. 98 til sølu. Hann hevur koyrt 62.000 km og er í góðum standi. Bilurin verður seldur um hóskandi boð fæst.
Tlf. 580002

LASTBILUR
2 tons lastbilur, LT35 v/ 1,5 tons krana. Selist um hóskandi boð fæst.
Tlf. 444502/252354

BÍLIGA TIL SØLU
Citroen Xsara 1.6i VTR árg. mars 2002, km 35000 hevur air con., cd/radio, varma í setrum, el spegl, el rútar, fjarstýrt sentrallás o.a. Bilurin er sum nýggjur. Prísuppskot 109.000 kr.
Tlf. 254100

DEILIR TIL HONDA CIVIC
1,4 GL árg 88-91 sera biliga til sølu. Motorur v/gearkassa, hurðar, rútar o.s.fr.
Tlf. 581800/441800

GOLF II
1.6 Diesel, árg. 89 til sølu. Nýsýnaður, pikadekk undir, anlegg og sportfelgur fylgja við.
Tlf. 507005 eftir kl. 15

TOYOTA CARINA II
2.0 GLi við skaða til sølu. Prísuppskot 7.000 kr.
Tlf. 225479

TOYOTA CAMRY 2.0
Í rímuligum standi. Koyrir gott. Automatisk gear við overdrive, til sølu fyri 12.000 kr. Ring og frætt nærri. Vit kunnu tosa um prísin. Sportfelgur fylgja við.
Tlf. 509494

VW JETTA 1.6 TD
Ein VW Jetta 1.6 TD, árg. 86, km 190000, motorur koyrir fínt, men bilurin krevur ábøtur, 2 sett av felgum eru við. Ring og fá meiri at vita á
tlf. 252326

LASTBILUR TIL SØLU
Lítil lastbilur til sølu. Man 10-153, 5 tons Hiab krani til sølu.
Tlf. 225590

DAEWOO LEGANZA TIL SØLU
um hóskandi boð fæst. Bilurin er frá 10/98, 60 mör. eftirkannaður 03/03, er sýnaður 11/03, lítið bróktur, bert koyrt 31.500 km, 4 góð vetrardekk fylgja við.
Ring 448810 og hoyr nærri

TIL SØLU
Bilradio við bandavspælara til sølu fyri 1.000,00 kr.
Tlf. 314103

CITROEN BX 1.4 TIL SØLU
er nýsýnaður, árg. 87, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 256081

NISSAN PATROL 3.0
Y61 til sølu.
Tlf. 423172

MAZDA 323 F 1.8i
Doch Twin cam 16 V, árg. 96, bilurin hevur sentrallás, el rútar framman, fløguspælara og vel. Til sølu fyri 50.000 ella hægsta boð yvir.
Tlf. 267584

TIL SØLU
Mitsubishi Pajero 2.5 TD árg. 88, styttra modellið, nýsýnaður, til sølu fyri 15.000 ella hægsta boð yvir.
Tlf. 267584

EYKALUTIR
til Opel Corsa árg. 93-00 og til Toyota Hiace Diesel, árg. 90-95, til sølu.
Tlf. 227922

TIL SØLU
Ein Opel Vectra 2.0i sum eykalutur, men koyrir.
Tlf. 371532 eftir kl. 18

DEKK TIL SØLU
Fýra píkadekk 175/70 R13 til sølu.
Tlf. 228398

MAZDA 323
hvítur, 2 bakspoylarar, sportfelgur, í góðum standi til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 503554/503555

AUDI 100
nýsýnaður, gráur, galvaniseraður, í sera góðum standi, til sølu fyri 18.000 kr.
Tlf. 503554/503555

VETRARDEKK
2 stk. Debica Furio + 2 stk. Dayton Winter = 4 stk. vetrardekk 185/70 14" til sølu fyri 2.000,- sum nýggj. Ring á
tlf. 259335, Janus

TIL SØLU SUM EYKADEILIR
Skoda Favorit, reyður, fronturin er 5 ára gamal, dekkini eru góð.
Tlf. 373372

FORD MONDEO 1.8 L
árg. 95, 118.000 km, pikadekk fylgja við. Penur og í góðum standi. Biliga til sølu.
Tlf. 504818/458042

TOYOTA COROLLA
Ein Toyota Corolla, Galla modell, 1,3 l. árg. 95 til sølu. Bilurin hevur koyrt 120.000 km. Hevur fingið TIDY CAR viðgerð fyri einum mánað síðan. Tónaðar rútar. Sportsfelgur við summardekkum umframt fýra spildurnýggj heilársdekk á orginalfelgum fylgja við. Ring og hoyr nærri.
Tlf 229511 ella 322800

PÍKADEKK TIL SØLU
4 stk brúkt Píkadekk til sølu fyri kr. 1.000,- Dunlop185/65 R15
Ring 314129/216622

TIL SØLU
Nýsýnaður Ford Sierra 2.0i árg. 1994, 143.500 km, DOHC 2.0i motor, aut. gear. Alufelgur, sóltak og el rútar framman. Sony CD-spælari, 4 stk. píkadekk á felgum fylgja við. Er at síggja í Bóndabrekku.
Tlf. 219673

NISSAN ALMERA 1.6 SLX
til sølu, árg. 96, km 115.000 í góðum standi, nýliga lakeraður.
Tlf. 503767 eftir kl. 16

OPEL OMEGA 2.0i
árg. 87, hevur skaða, nógvir eykalutir fylgja við, biliga til sølu.
Tlf. 519726

Amboð

STÓRUR
dreygibonkur til metal, bíliga til sølu.
Tlf. 503938

TIL SØLU
Ein krani av slagnum Tico 1385, við kølara og fjarstýring, er til sølu. Ring
Tlf. 217900

PÁHANGSVOGNUR TIL SØLU
av merkinum Brennerup, stødd: 150 l., 100 b., 35 h., 400 kg. Óbróuktur, nýprísur 6.000 til sølu fyri 4.000,-
Tlf. 422082

BYRSA TIL SØLU
Ein hálv automatisk Remington cal. 12 í góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 226956

FORD TRAKTORUR
61 hestar til sølu. Nærri upplýsingar fáast á
Tlf. 361188/225288

KØLARI TIL SØLU
Ein opin, lítið bróktur veggkølari biliga til sølu. Kølarin er til stikkontakt og er í sera góðum standi. Nærri fæst at vita við at venda sær til
tlf. 474000

NÚ ERU TEIR HER
Tredal viðfestivognar úr Noregi, snøggir og sterkir. Kunnu síggjast og roynast á Velbastað.
Tlf. 218101

Arbeiði

HYGG HER!
Hevur nakar brúk fyri hjálp at gera reint til jólar,
so ring 722304

BODY PAINTING
Nú ber til at tekna seg til nýtt skeið í body painting, avmarkað nøgd.
Tlf. 333281

HALLÓ, HER ERU VIT
2 álitandi gentur, 14 ár. Vit vilja gjarna hjálpa til eftir skólatíð. Sum t.d. í handli ella eldri fólki, annars alt hevur áhuga.
Tlf. 259228 ella 263925

UNGUR MAÐUR
Ungur maður við lastbilkoyrikorti søkir fyrifallandi arbeiði í Havn.
Ring á tlf. 224943

FLISER
Indedørs flisearbejde udføres (Tórshavn og omegn).
Tlf.228058 el. 314434

Barnaansing

HEY HEY
Vit eru tvær fimtan ára gamlar gentur á Skálafjørðinum, ið ynskja at vera dadda eftir skúlatíð. Ringið á
tlf. 265664

Barnaútgerð

YMIST TIL SØLU
Kalesjustólur óbróuktur til sølu fyri kr. 1.700,-. Nýggjur koyriposi er við. Rimasong 60x120 óbrúkt til solu fyri kr. 400,-. Nýggj babylift til solu fyri kr. 400,-.
Tlf. 256517

TIL SØLU
Lítið bróuktur barnastólur við koyriposa til sølu fyri bert 1.000,- sær út sum nýggjur. Hoppireiggja 200 kr.
Tlf. 508142

TRILLE KOMBIVOGNUR
til sølu, bert bróuktur til eitt barn, sum nýggjur, við lift, puslitasku, regnslag og stólasetur. Prísur 3.000,-
Tlf. 447283/220064

RIMASONG
Væl viðfarin og við sera góðari springmadrassu, selist fyri 1200 kr. Kann stillast í tríggjar hæddir.
Tlf/sms 226235 aftaná kl. 18

TIL SØLU
Tvær soft liftir til Simo Betrini tvíburðavogn til sølu fyri 300 kr. stk. (Nýprísur 500 kr.) Bert brúktar nakrar fáa ferðir.
Tlf. 321080

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Myrkabláur Brio barnavognur til sølu fyri 1500,- Regnskjól, flugunet, puslitaska og dýna fylgja við.
Tlf. 319511/519511

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Bláur Simo barnavognur v/ lift, dýnu og kodda til sølu fyri 2500 kr. og ein Babydan beriseli fyri 300 kr.
Tlf. 310455

TIL SØLU
Bilbarnastólur: Maxi-Cosi mino 0-10 kg. Siege multi 0-18 kg. Borðstólur at hanga, ein barnareiggja úr plast.
Tlf. 314797/514797

TIL SØLU
Tveir vognar, 1 koyristólur uttan kalesju og 1 paraplyklappvognur, 1 lambaskinn, 1 myrkablá paraply, blátt innkeypsnet. Selist alt samlað fyri 1.200 kr.
Tlf. 322850

RIMASONG
Rimasong úr ljósum træi (nýprísur 980,- kr.) v/ madrassu (nýprísur 599,- kr.) seingjarand, himmal, dýnubetrekk + pútuvár, alt eins. Sum nýtt. 1.500 kr.
Tlf. 310215

BABYLIFT OG SNUGLIPOSI
til sølu fyri ávíkavist kr. 550,- og kr. 300,- Bert brúkt til eitt barn og sær út sum nýtt.
Tlf. 317565

Bátaútgerð

TIL SØLU
40 fót snellubátur.
Tlf. 448145/218195

TIL SØLU
Fiskiloyvi 5B til sølu.
Tlf. 220756

7-MANNAFAR
við 25 HK diesel motori bíliga til sølu.
Tlf. 312954

GPS MÓTTAKARI TIL SØLU
Nýggjur GARMINI eTrex til sølu fyri 1.995,- Kr. Vekt 150 gram. Er fyrireikaður til WAAS http://www.gps. dk Kann uppdaterast og koblast til telduna.
Tlf. 212180

8-MANNAFAR TIL SØLU
við ella uttan fiskiloyvi. Áhugað kunnu ringja á
tlf. 455986/223857

STÝRIHÚS
Stýrihús til 20-40 brt. bát til sølu um hóskandi boð fæst.
Sp/f Hellisendi, tlf. 458811/265957

ER TAÐ NAKAR
ið eigur ein GPS/plottara, ið kann nýtast til eina Apelco antennu, at selja mær. Ring
tlf. 265425

EKKOLODD
ynskist til keyps.
Tlf. 312093

GOGGUKNÚSARI
ynskist til keyps.
Tlf. 312093

SEKSÆRINGUR
Við fiskiloyvi til sølu. Útgerð: Sjálvstýrari, 4 automatiskar snellur og 1 hálvautomatisk. Bjargingarbátur, yvirlivilsisdrakt, VHF, ekkolodd, GBS og plottari.
Tlf. 262303

TIL SØLU
OMC Drev, einkulta skrúvu v/ hydraulik trim til sølu fyri 6.000 kr. GPS-GP 30 v/ antennu til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 222211

BÁTUR TIL SØLU
26 fót Grimsey árg. 83, 60 HK Sole diesel motorur, árg. 2001, við fiskiloyvi.
Tlf. 448346

TIL SØLU
Ein skrúva v 17 x 12, aksil 30 mm x 2,70 og stevnírør ø 30 mm.
Tlf. 310322

GLASFIPURBÁTUR
Hann er 16/18 fót frambygdur og ein 40 hk leysamotorur fylgir við. Hygg á www.birgir.krea.fo ella
ring 564040

Bingo

GOTT JÓLABINGO
verður í Stórhúshøll leygardagin 6. des. kl. 15.00. Vinningar á lutaseðli verða m.a. ræst før. krov, gávukort 1.000,- kr., karamellur, dunnur, sodavatnskassar. Rís á la mande og kaffi í steðginum.
Í F Fótbóltur

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 1. desember, kl. 19.00.Nógvir góðir vinningar. Høvuðsvinningur á lutaseðlinum er ein mikroovnur frá LM-Handlinum. Nógvir aðrir góðir vinningar sum t.d. ræst kjøt og døgverðamatur til jóla. Eisini verður bingola og 20,- spæl .
Astma- og Allergifelagið

TBF
hevur sítt árliga gásabingo í Skólahollini í Trongisvági mánakvøldið 8. desember kl. 19.00.
Tvøroyrar Borðtennisfelag

JÓLABINGO
Stórt jólabingo verður í Pálsstovu hósdagin 4. des. kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Full pláta, aðru hvørja ferð 1/2 ræst krov og aðru hvørja ferð 1 gás. Á lutaseðlinum, dunnur, karamellur, dekoratóinir, baby-born dukkur við klæðum, fartelefon, nissur. Kurv við ymiskum til jóla. Ein full balja við døgurðamati til jóla. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kyndil

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 29. nov. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Á lutaseðli 2 ísl. krov.
Eldrafelagið Borgin

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba tórsdagin 4. des. kl. 19.00.
Nevndin

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba friggjakvøldið 28. nov. kl. 20.00.
Nevndin

SUÐUROYINGAR
Gott jólabingo verður í Framtíðini 10. des. kl. 19.30.
K.F.U.M.-skótarnir

JÓLABINGO
verður í Mettustovu mánakvøldið 1. des. kl. 19.00.
Kvinnufelagið.

FRÁ EYDNUNI
Gott jólabingo verður sunnudagin 30. nov. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. At vinna gás, dunnur, 1/2 krov, karamellur. Á lutaseðli nógv gott at vinna. Eykaspælið 1400 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

VINN TARV
Við at skriva TARV á eitt sms-boð og senda tað til 1441, ert tú við í kappingini um tann stóra TARVIN. Sms-boð kostar kr. 25 + vanl. smstakst. Til ber at senda fleiri sms-boð. Sí á portalinum.
Báran

JÓLABINGO
Stórt Bárubingo verður í Skálanum mánakvøldið 1. des. kl. 19.30. Høvuðsvinningur stórur jólapakki. Vinningurin til fulla plátu føroyskar dunnur. Hópin av góðum vinningum. Dunnur, karamallur, mandarinir, sodavatn, kjøt o.m.a. Gjaldast kann við FR-Visa korti. Seinasta bingo í ár.
Bygdarfelagið Báran

SUÐUROYINGAR
Rimmar gásabingo verður í skólanum mánakvøldið 1. des. kl. 19.00. Hvør full pláta før. gás v/m. Tvær rekkjur før. kjøt. Karamelleuskjur verða burturlutaðar millum spølini. Á lutaseðli: Flogferð, før. krov, gæs, olja og nógva annað.
Flogbóltsdeildin TB

KAGGIN
Gott jólabingo verður fríggjakvøldið 28. november kl. 20.00. Vinningar m.a.: Gæs, jólakalendarar og kurvar. 6. og 12. spæl gávukort á 1.000 kr. 15 vinningar á lutaseðli m.a. karamellur, jólakalendarar og kurvar, før. gæs og 3 før. krov. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl.
Kaggin

GOTT BARNABINGO
verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 6. desember kl 15. Nógvir góðir vinningar so sum leikutoy, góðgæti, karamellur og nógv annað gott. Síðvuvinningar verða latnir. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Winther súkkla til 10 ár, reyð/grá/svart, burturmist/tikin í badmintonhøllini týsdagin 25.11
Ring 312844 ella set hana í Sornhúsgøtu 18

SÓKNAST VERÐUR
eftir einum gásapari við 4 ungum. Steggin hevur ring um beinið við tlf. 422358. Bøgan hevur ring um beinið við tlf. nr. 452026. Allir gráir, útsleptir Inni í Haga í Funningi. Hevur nakar sæð tey, so ring
tlf. 423236

BURTURMIST
Lítil dukka í hvítum kýsa, reyðum/gulum jakka, gulprikkutum buksum. Burturmist við SMS, Skemmuna, Sjúkrahúsið ella Vøruhúsið á Hjalla. Eg leingist eftir dukkuni. Marian 3 ár.
Tlf. 456407

NOKIA 8310
er mist í miðbýnum í Havn leygarkvøldið. Hon er svørt og reyðbrún og nógv sakna.
Tlf. 319801

REKA-STEVNAN 2003
Reyður anorakkur og ein violet svimjitaska við handklæði, svartari svimjidrakt, bláum svimjibrillum og Skeggjar svimjihúgvu burturmist. Finningarløn verður latin. Vinarliga ring
Tlf. 212081

Býli

ÍBÚÐ Í HVIDOVRE
107 fermetra stór íbúð til framleigu frá 1.1 -04 til 31.6-04 møguliga longri. Ring og fá meira at vita, best seinnapart ella kvøld.
Tlf.0045 36788072 ella mobil 0045 25823654

KAMAR TIL LEIGU
Kamar við atgongd til køk og bað í miðbýnum til leigu frá 1. desember.
Vinarliga ring 321441 ella 211445

HÚS Í HAVN TIL LEIGU
Eini hús í frálíkum umhvørvi nær við Norðurlandahúsið til leigu í 1 ár. Prísur er kr. 6.500 + ljós og hiti, um mánaðin.
Tlf. 228148 - 223299

LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Tórshavn.
Tlf. 508730

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarligt fólk søkir eina íbúð í Havn.
Tlf. 254866

UNGUR MAÐUR
søkir íbúð í Klaksvík ella Leirvík, eg fari væl um. Gjaldi til tiðina. Ring skjótast gjørligt.
Tlf. 229379

KAMAR TIL LEIGU
Í miðbýnum í Havn er eitt kamar til leigu fyri 2.000 kr. um mánaðin. 1.000,- kr. í depositum.
Ring 509253

HÚS YNSKJAST TIL LEIGU
í Tórshavnar umráðnum av friðarligum ikki-roykjandi fólkum. Max. 6.000 kr.
Tlf. 224910 ella 317865

ÍBÚÐ YNSIKST
Trý tilkomin friðarlig fólk, sum hvørki roykja ella drekka og ganga væl um, søkja íbúð í Tórshavn, helst í miðbýnum ella nærhendis. Gjalda til tiðina.
Tlf. 519364 ella 319364

TIL LEIGU
Minni íbúð til leigu til friðarlig fólk. Vælegnað til 1-2 pers. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1722/1

ÍBÚÐ YNSKIST Í LEIRVÍK ELLA NÆRHENDIS
Tvey ung fitt friðarlig fólk, sum hvørki roykja ella drekka søkja kamar ella íbúð í Leirvík ella nærhendis. Gjalda til tiðina.
Tlf. 267233

VIT SÓKNAST
eftir eini íbúð við innbúgvi í Havn til eitt starvsfólk í tíðarskeiðinum 1. februar til 1. august 2004. Setið tykkum í samband við Fiskasøluna
tlf. 345345

ÍBÚÐ TIL FRAMLEIGU
Íbúð til framleigu á oyrasundskolleginum frá 15. desember til seinast í januar. Mail: aeiversen@yahoo.co.uk
Tlf: +45 61510293

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð ynskist í Tórshavn, fara væl um og gjalda til tiðina. (Uml. 4.000 kr. við ljós og hita).
Tlf. 228811/344604, arb. Sólvá

HALLÓ, HYGG HER!
Tú, sum situr einsamøll/einsamallur í heldur stórri húsum, og um tú ikki hevur tað so gott við tí, og eg sum leiti eftir verilsi ella íbúð til januar, eg eri einsamøll dama í 40-unum, havi gott arbeiði, roykí ikki og haldi meg frá drekkarí og eri av fittastu fólkum. Hetta má vera í Tórshavn. Um áhugi er, bara fyri eina tið og drekkarí má ikki vera til staðar. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 3248

ÍBÚÐ/HÚS Í KLAKSVÍK
Sjómaður leitar eftir onkrum at búgva í í Klaksvík. Eri friðaligur og fari væl um.
Tlf. 313372 ella 215489

HEY HEY HAVNABORGARAR!
Vit eru tríggjar friðarligar gentur, 27, 25 og 20 ár, sum fegnar vilja leiga eina íbúð ella hús frá tykkum. Min. 3 kømur. Max. 7.500,- v/ ljós og varma.
Tlf. 226750/264424

ÍBÚÐ YNSKIST
í Klaksvík ella Eysturoy. Friðarligt par ynskir, at leiga íbúð í Eysturoy ella Klaksvík, skjótast gjørligt. Hava tit eina íbúð vinarliga
ring 218929 ella 224224

HÚS Í SØRVÁGI TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, eru eini 1 planshús til støddar 132 fetmetrar til sølu.
Tlf. 333485/226169

ÍBÚÐ Í KBH
Møblerað 2-rúms íbúð við altan, sentralt á Vesturbrúgv til leigu vikuskifti ella longri. Nærri fæst at vita á
tlf. 261560

ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN TIL LEIGU
Ein spildurnýggj íbúð uppá 68 fermetrar við sera góðum útsýni, hevur 2 sovikømur, til leigu frá 1. januar 2004 til friðarlig fólk, ið hvørki drekka ella roykja. Prísur: 6.000,- umframt ljós og hita. 2 mør. depositum! Skriva til: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1713/5

KAMAR TIL LEIGU
Hevur tú hug at leiga saman við 3 ungum gentum, so hava vit eitt gott kamar miðskeiðis í Havnini. Felagsrúm eru: stórur køkur, hjallur, 2 stovur, baðverisli v/vaskimaskinu + eyka wc, gangur og durur. Skrivi til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1709-a

Dansur

BARNADANSUR
Barnadansur verður í Jómsborg hvørt mánakvøld kl. 19, øll eru vælkomin.
Jómsvikingar

Dýr

BORDER COLLIE
hundahvølpur til solu fyri 300 kr. Kann latast í viku 48.
Tlf. 504958/504340

BORDER COLLIE HVØLPAR
Fýra Border Collie hundahvølpar til sølu.
Tlf. 373578

KETTLINGAR
Tveir sera fittir kettlingar kunnu avheintast. Mamman er sera fornuftig, letur hurðar og vindeygu upp, tá ið hon skal út ella inn – men letur ikki aftur eftir seg.
Tlf. 449942

KETTA HORVIN
Ketta, lítil av vøkstri, spøk, er horvin undir Glasheygji. Er grástríput á rygginum og høvdinum. Bein, búk og hálshvít. Hon er merkt við chipsi. Um nakar hevur sæð hana, vinarliga ring
Tlf. 313878 ella 218589

KETTLINGAR
3 kettlingar, ein gráur/hvítur, hinir svartir/grair. Bert latnir djóravinum.
Tlf. 452198/229418

JÓLAGÁVAN!
West higland white terrier hvølpar til sølu. Racuhundur ið er vælegnaður til tað føroyska veðurlagi - fullvaksin vekt 7 kg.
Ring á tlf. 0045 40684836

HUNDAHVØLPUR
Sera fittur hundahvølpur verður latin, vegna serligar umstøður. Bert til djóravin.
Tlf. 314845

YORKSHIRE HVØLPUR
Bozo er ein 8 vikur gamal Yorkshire terriari ið er til sølu. Hann hevur stamtalvu. fullvaksin vekt: 2,5 kg
Ring á tlf. 0045 40684836

KANINUNGAR
Nakrir sera fittir kaninungar kunnu fáast, bert til djóravinir.
Tlf. 423512

MARSVÍN KUNNU AVHEINTAST
Vit hava 2 marsvín, uml. 2 mør. ið kunnu avheintast av djóravinum.
Tlf. 315653 eftir kl. 18

HAMSTRARABÚR
til sølu.
Tlf. 217335

PAPAGEYKUR TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, er ein Pennauts Parakit til sølu. Longd 36 cm. Sera litrík.Ansvein Sigurðsson, Túgvuvegur 1, Klaksvík
Tlf. 271207

Fundir

EYKAAÐALFUNDUR
hjá Áhugafelagnum hjá Støkk verður í Støkkhøllini mikukvøldið 10. des. kl. 20.00. Skrá: Avtøka av felagnum.
Tlf. 448502

PENSJÓNISTAFELAGIÐ HUGNI
Klaksvík, hevur jólaveitslu í Kl. Sjómansheimi týsdagin 9. des. kl. 18.00. Sigið frá á tlf. 455567/455208 áðrenn leygardagin 6. des.
Nevndin

HAGAFUNDUR
Hagafundur fyri Rossabotnshagan í Hvalvík verður hildin í Hvalvíkar skúla fríggjakvøldið 28. nov. kl. 20.30. Til viðgerðar 1) Val av hagamanni/hagamonnum 2) Val av hagastýri 3) Ymist.
Hagastýrið

HEILAFELAGIÐ!
Jólahugni verður á Sernámsdeplinum leygardagin 6. des. 2003. kl 15. Møti fjølment!
Nevndin

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Morris (handy) 6 pers. uppvaskimaskina. Sum nýggj fyri 700,-
Tlf. 312882

TURKITRUMLA TIL SØLU
Elektroferm. Manglar reim, annars í góðum standi, væl viðfarin, 800 kr.
Tlf. 316219

TIL SØLU
Góð gomul frystiboks (stór). Handy-Sit barnastólur til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 314567

GOMUL TOYRULLA
Gomul toyrulla (antikk) í sjáldsama góðum standi, merki Original-Haller, til solu til hægstbjóðandi.
Tel. 252601

TIL SØLU
3 frystiboksir, taka 14 stampar.
Tlf. 448196/252383

TIL SØLU
Zanussi uppvaskimaskina 3 ár, b. 45, d. 58, h. 84, 2.000 kr. Gorenje komfýrur 3 ár, b. 50, d. 60 h. 85 2.000 kr. Gram køliskáp 3 ár, b. 55, d. 58, h. 82 2.000,- kr. Alt samlað bert 5.000,- kr.
Tlf. 316550/516550

Innbúgv

SOVISOFA
Sovisofa til sølu fyri bert 500,-
Tlf. 312882

TIL SØLU
120 cm. boksmadrassa v/ beinum til sølu. Nýprísur 5.000,- nú 2.000,-
Tlf. 312882

SOFA TIL SØLU
Ljósagrá 2 manssofa til sølu, sær gott út, kann brúkast til gestaverilsi.
Tlf. 269909 eftir kl. 16

LEÐURSOFASETT
Svart leður sofasett 3+2 til sølu, 1 ára gamalt. Er sera lítið brúkt. Prísur 10.000 kr.
Tlf. 223091

TIL SØLU
2-mans leðursofta til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 254866

YMIST TIL SØLU
1 hvittlútað song v/ madrassu std. 90 x 200 fyri 800 kr.
1 ungdómssong, blá, sum kann lyftast upp har goymsla er í botninum, std. 77 x 200, kostnaður 600 kr.
1 lútað teldu/skrivaraborð, std. 60 x 120, kostnaður 500 kr.
1 tremmusong v/ madrassu til sølu fyri 350 kr.
Tlf. 373116

BOKSMADRASSA
við snøggum galvi, mát 90 x 200 cm, selist fyri 1200 kr.
Tlf/sms 226235 aftaná kl. 18

CRAWFORD HURÐ
v/ 4 rútum, br. 3.20 hædd 2.90 biliga til sølu.
Tlf. 219021

TIL SØLU
Ein sera bílig boksmadrassusong v. beinum til solu fyri 400 kr. Seingin er 90 x 200 og næstan 2 ára gomul.
Ring 506043 ella 256182

TIL SØLU
Myrkt hyllasystem við skápum, skuffum og reol, (3 sektiónir) í góðum standi til avheinting
Tlf. 447665

FLYTTESALG
sofa 3+2, med bord 4.000, spisebord ovalt afsyret bøg med 4 stole 1.500,
computerbord 300,
kommode 300.
Tlf. 311458/511458

KURVASTÓLUR
Armstólur, brúnur og í café-stíli, góður at sita í, til sølu fyri 250 kr.
Tel. 252601

HALLÓ HALLÓ HAVNIN!
Er tað nakar, sum hevur eina sovisofu at selja mær. Prísuppskot 800 kr. Annars hevur alt áhuga. Bara ring.
Tlf. 265862/211962

YNSKIST
Telefonbonkur og skrivstovustólur ynskist. Telefonbonkur v/ skuffum og skrivstovustólur við hjólum.
Tlf. 314797/514797

KOYGGJUSONG
Er tað nakar, sum hevur eina koyggjusong til sølu, vinarliga ringið
tlf. 314797/514797

TIL SØLU
Dupultsong, hvít lxb=212 x 180. Uttan madrassur kr. 500,00
Ring 314129/216622

YNSKIST TIL KEYPS
Palisander skenkur og palisander sofaborð ynskist til keyps.
Ringjast kann eftir kl. 17.00 á tlf. 448914

TIL SØLU
Lenistólur leður v/krakki, 1 ára gamal, kr. 950,-.
Tlf. 251450

YMISKT TIL SØLU
Furusong v/ boxmadrassu og toppmadrassu, 160x200, 1.200 kr., boxmadrassa 90x200, 250 kr., glasskáp ljóst, h. 170 b. 65, dj. 35, 800 kr.,
brúnur leðurstólur 400 kr.,
brúnur lenistólur 200kr.,
2 sekt. palisander reolveggur v/ skápi og hillum (200x170) 500 kr.
Tlf. 516089

Leikur

JEEPUR
40 cm. langur við fjarstýring og uppladara til solu fyri 1700 kr.
Tlf. 322185

Lutaseðlar

NES SÓKNAR ÍTRÓTTARFELAG
Notarius Publicus hevur drigið hesar vinningar:
Premier leage túrur 6052.
1000 l. olja 7181.
Apex flogferðaseðil 7470.
Apex flogferðaseðil 9436.
Pioneer DVD spælari 7307.
Hevur tú vunnið, kanst tú ringja tlf. 219479 ella 225486
tlf. 219479 ella 225486

BRÚGVIN
Hesir seðlar hava vunnið:
38798, 11747, 38748 og 11174.
Vit takka fyri stuðulin.
Brúgvin

Matur

RÆSTUR FISKUR TIL SØLU
25 kr. pr. greipu. Verður koyrt til hurðina, har sum koyrast kann.
TYlf. 263152

Pløgg

SILVUR TIL FØROYSKA KVINNUBÚNAN YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur silvur til føroyska kvinnubúnan biliga til sølu, so vil eg fegin frætta. Vinarliga ring
Tlf. 213777

BRÚÐARKJÓLI
Ein ráhvítur brúðarkjóli og 2 gentubrúðarkjólar, stødd 3 og 10 ár til sølu.
Tlf. 373439 ella 504648

TIL SØLU
Fyriklæði, turriklæð og kýsi til føroyska búnan til solu fyri 4.000 kr. Settið er baldýrað í myrkablátt silki.
Tlf. 444267

Samband

PARTNER SØGES
Kvinde mellem 30 og 40 år som ønsker børn og familie. Jeg er selvstændig dansk landmand (planteavl), bor i Midtjylland, nær naturskønne områder mellem Viborg og Vejle. Jeg er 49 år, har brunt hår, grå grønne øjne, 182 cm. høj, 84 kg. er ikke ryger, har et godt helbred, er trofast og ærlig, har ingan børn, går ind for gensidig respekt og frihed for hinanden i et varigt forhold. Interesser: Naturen, mit erhverv, rejser og venner. Jeg søger en kvinde, som ønsker familie, der kan lide at bo på landet (3 km fra landsby med købmand og skole) er ikke ryger, trofast og (k)ærlig og har humor. Et barn under 10 år ingen hindring. Alle breve med foto får svar med foto. Skriv til
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1642/3

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður á Strondum sunnudagin 30. nov. kl. 16. Spælt verður um ein Apex ferðaseðil við Maersk til Danmarkar og sum verður drigin fyri jól.
Strálan

Súkklur

YNSKIST
Ein dreingjasúkkla við uml. 21 gearum, ynskist til 10-12 ára gamlan drong.
Tlf. 314797/514797

APRILIA RALLY
til sølu, sær gott út og koyrir væl.
Tlf. 260308/311472

JENSEN KAPPSÚKKLA
stødd 56, Ultegra 9 spid við spd pedalum til sølu fyri hálvan pris. Nýprísur 14.000 kr.
Tlf. 509665

Teldur

NINTENDO 64 VIÐ SPØLUM TIL SØLU
Tlf. 316464

X-BOX TIL SØLU
Ein X-box við 5 spølum (Bloody Omen, Splinter Cell, Metal Gear Solid 2, Enter the Matrix og Dead or Alive 3 til solu fyri 1600,- kr.
ahh@kallnet.fo
tlf. 321283 ella 255909

TELDA TIL SØLU
AMD xp 2000+, 256 md DDR RAM (3200), Soltek botnkort við kanals ljódkort, AGP x8 og usb 2.0, 80 GB harddisk, 32x12x40 brennara, 17" skerm, 1 joystik, 1 joypad, Win XP pro. Prísuppskot kr. 6200.
Tlf. 313471/507585

FARTELDA TIL SØLU
Compaq Evo N610c, Intel pentium 4, 1.8 GHz, 256 MB Ram,